## SANDOYAR Barnaverndartænasta

**Søkt verður eftir 2 stuðlum til familju í Sandoynni at byrja skjótast til ber.** Stuðulsstørvini eru ávikavist 20 og 10 tímar um vikuna.

Stuðulsstørvini eru tíðaravmarkaði til **31. desembur 2010,** men kunnu møguliga verða longd.

Stuðulsstarvið á 20 tímar er í dagtímunum, og arbeiðsstaðið er heima hjá familjuni og í barnagarði.
Stuðulsstarvið á 10 tímar er seint seinnapart og kvøldabeiði, og arbeiðsstaðið er heima hjá familjuni.
Endamálið við stuðlinum er at stuðla familjuni bæði heima og á dagstovni.

Ynskiligt er, at tey, ið sett verða, hava viðkomandi útbúgving og / ella royndir. Viðkomandi skal hava góð samstarvsevnir, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Setanin er sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Nærri upplýsingar** fáast við at venda sær til Sandoyar Barnaverndartænastu á tlf. 288024 millum kl. 8.00 og 12.00.

**Skrivlig umsókn** við hjáløgdum próvskjølum og viðmælum skal sendast til Sandoyar Barnaverndartænastu í seinasta lagi 20. august.

**Sandoyar Barnaverndartænasta**
Skúlavegur 3
230 Húsavík

Sandoyar Barnaverndartænasta er eitt samstarv um umsiting av barnaverndarøkinum millum Skopunar- Sands- Skálavíkar- Húsavíkar og Skúvoyar kommunur. Í økinum búgva í løtuni 1.440 fólk og av hesum eru 346 børn og ung.

FØROYA HANDILSSKÚLI

## HD útbúgvingin September 2010

HD útbúgvingin er ein parttíðar hægri útbúgving fyri komandi og verandi leiðarar í privatum virkjum og á almennum stovunum og virkjum.

### HD 1. partur

HD 1. partur tekur tvey ár og er ein sjálvstøðug grundútbúgving innan vinnubúskap. Fyrra ári eru lærugreinirnar vinnubúskapur, dátugreining og samfelagsbúskapur. Seinna ári eru lærugreinirnar vinnulívsrættur, háttalæra, vallærugreinir og verkætlan. Til ber at taka stakar lærugreinir, tó ikki háttalæru og verkætlan.

HD 1. partur verður boðin út í samstarvi millum Føroya Handilsskúla og Handilsháskúl-an, Århus Universitet. Undirvíst verður eftir ætlan mána- og mikukvøld kl. 16.00-19.10.

**Upptøkutreytir á HD 1. parti** er gymnasial útbúgving, HH, HT, HIF, HF og student.

**Nýggjur flokkur byrjar í september 2010. Tilmeldingarfreistin til HD 1. part er 10. august 2010.**

Umsóknarbløð og kunning um HD 1. part eru á heimasíðu Handilsskúlans www.fh.fo Umsóknarbløð við prógvum verða send til Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, FO-110 Tórshavn.

### HD 2. partur

HD 2. partur tekur tvey ár og velur tú tá sergrein. Á Handilsháskúlanum, Århus Uni-versitet er í løtuni er møguligt hjá føroyskum lesandi at taka sergrein í Roknskap og Búskaparstýring ella sergrein í Fíging. Lesturin er skipaður sum fjarlestur og lesandi eru innskrivaði við Handilsháskúlan, Århus Universitet. Møguleiki er at taka allar próvtøku í Føroyum, eyka gjald er fyri hesa tænastu.

**Nýggir flokkar, har møguligt er at lesa sum fjarlesandi, byrja í september 2010. Útboðið av báðum sergreinunum er treytað av at nóg nógv lesandi tekna seg. Tilmeldingarfreistin til HD 2. part er 1. juli 2010.**

Umsóknarbløð eru tøk á www.asb.dk. Umsóknarbløð kunnu sendast til Ritu K. Madsen, samskipara á Handilsháskúlanum, Århus Universitet, teldupostur: rkm@asb.dk. Somuleiðis ber til at venda sær til Ritu K. Madsen við ivamálum og spurningum.

Eru spurningar ella ivamál, ert tú vælkomin at venda tær til skrivstovu skúlans, opið er mánadag-fríggjadag frá 8.00-16.00. Skrivstovan er tó stongd í tíðarskeiðinum 3. juli-8. august.



**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tlf 317177
Fax 313374
www.fh.fo

INPACT AUDIT

## SUMMARFRÍ

Vit byrja aftur eftir summarfrítíðina mánadagin tann 9 august

**Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT**
LØGGILT GRANNSKOÐARAVIRKI
Postrúm 191
110 Tórshavn
telefon: 31 47 00; telefax: 31 38 15
heimasíða: www.inpact.fo
t-postur: inpact@post.olivant.fo

**Member of international network of professional accountants**

## Summarfrí

**Vegna summarfrí er avgreiðsla okkara stongd frá mánadegi 19. juli til og við fríggjadag 13. august 2010.**

Samband fæst við okkum á telefon 591600 og 591602 ella á telduposti gs@gs.fo

GRANNSKOÐARASTOVAN
Heiðalon Heiðavegur 31 600 Saltangará

Lesið Sosialin -so eru tit við!

fk

## Matseðilin

*Hósdagin 5. august*
**Høsnafrikassé - Svínakambur**

*Fríggjadagin 6. august*
**Milliónbúffur - Rivjasteik - Stoktur medistari**

*Leygardagin 7. august*
**Rullusteik**

*Mánadagin 9. august*
**Kókað neytakjøt - Fiskafrikadellur**

*Týsdagin 10. august*
**Høsnarungabringa - Forlorin hara**

*Mikudagin 11. august*
**Stoktur fiskur - Kjøtfrikadellur**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**

www.sosialurin.fo